# Farum í ferð við at taka Brøndby

**Jón Rói Jacobsen snoddaði leygardagin til, hvussu tað gongur fyri, seg, tá ið Brøndby vitjar í Odense**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Fjarstøðan millum FCK á fremsta plássinum og Brøndby á næstfremsta plássinum í superliguni dragnaði eitt sindur í vikuskiftinum. Leygardagin var úrslitið 1–1, tá ið Brøndby var í Odense, og FCK vann 1–0 sunnudagin, tá ið Esbjerg var í Parkini.

Munurin var í vetrarsteðginum tíggju stig.Í trimum teimum fyrstu umførunum eftir vetrarsteðgin minkaði hann til fýra stig, men nú er hann seks stig.

Farum er spildurnýtt felag í bestu deildini. Teir søgdu undan kappingarbyrjan í fjør, at fremsta málið hjá teimum var at varðveita plássið og harvið ikki at flyta niður aftur.

Á so mongum økjum hevur tað verið buldraligt hjá Farum, men fótbóltsliga gongur framúr. Sunnudagin vann Farum í Aalborg, og nú eru teir á uppflytaraliðnum á triðja plássi. Teir eiga framvegis ein útsettan dyst á ímóti AGF. Um teir megna at fáa fult ta ferðina, so verður tað Farum og ikki Brøndby, sum verður í hølunum á FCK, og so verður munurin frá nummar eitt og til nummar tvey minni enn seks stig.

Christian Andersen, venjarin hjá Farum, sigur, at tað er hugaligt, at liðið hjá honum, nú tað resta tólv umfør, hevur fingið fleiri stig, enn teir høvdu torað at rokna við, at teir skuldu fáa í øllum 33 umførunum, men hann undirstrikar framvegis, at málið er at sleppa undan niðurflytingini.

Í Brøndby vóru teir ikki misnøgdir við javnleikin i Odense, har OB hevur staðið seg rættuliga væl síðani vetrarsteðgin. Jón Rói Jacobsen var heldur ikki hesa ferð ímillum teir fyrstu ellivu. Hann varð settur á vøllin, tá ið tveir minuttir vóru eftir. Tað ljóðar ikki av nógvum bara at hava spælt tveir minuttir, men tað hevur stóran týdning. Eftir at hann hevur sitið uttanfyri tvær ferðir á rað, kann tað verða so skjótt, at ein ungur spælari fer at hugsa og spyrja seg sjálvan, um nú venjarin yvirhøvur roknar við honum, ella um hann hevur gloymt hann heilt.

At Michael Laudrup setti Jón Róa Jacobsen á vøllin boðar frá, at føroyski landsliðsspælarin ikki er gloymdur av toppinum í Brøndby.

### Botnurin tjúkkur

Helmingurin av liðunum í superliguni eru framvegis í vandi fyri at flyta niður. Umframt ítróttarliga vónbrotið er tað stórur fíggjarligur smeitur at enda so aftarlaga. Farum venjarin, Christian Andersen, metti í síðstu viku, at um Farum hevði flutt niður, so hevði tað í hvussu so er kostað felagnum seks milliónir krónur.

Størstu hóttanina av niðurflyting liggja Silkeborg og Viborg undir. Sunnudagin hittust jysku liðini, og tað endaði málleyst. Harvið eru tey bæði feløgini framvegis bestu boðini upp á niðurflyting.

AB og Køge vóru partar í botngysara í Gladsaxe. Um AB hevði havt tapt, so varð roknað við, at venjarin hevði sitið rættuliga leysur í saðlinum. Men AB spældi væl og vann 3–1, og nú verður spurt, um Køge, sum stóð seg lutfalsliga væl í heyst, fer at fara niður við flagginum.

AGF hevði ikki fingið stig síðani vetrarsteðgin, og FCM hevði ikki tapt síðani vetrarsteðgin. Á heimavøllinum í Århus toldi AGF ikki at tapa, og tað gjørdu teir heldur ikki. FCM varð sent til hús við 3–2 tapi, eftir at AGF hevði verið á odda 2–0.

### Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK | 22 | 12 - 7 - 3 | 34 | 21 | 13 | 43 |
| 2 | Brøndby (M) | 22 | 10 - 7 - 5 | 42 | 23 | 19 | 37 |
| 3 | Farum | 21 | 12 - 0 - 9 | 33 | 37 | -4 | 36 |
| 4 | FCM | 22 | 9 - 6 - 7 | 34 | 28 | 6 | 33 |
| 5 | OB (S) | 22 | 8 - 7 - 7 | 35 | 29 | 6 | 31 |
| 6 | Esbjerg | 22 | 8 - 7 - 7 | 42 | 40 | 2 | 31 |
| 7 | AaB | 22 | 8 - 3 -11 | 28 | 33 | -5 | 27 |
| 8 | AB | 22 | 6 - 8 - 8 | 28 | 28 | 0 | 26 |
| 9 | AGF | 21 | 7 - 5 - 9 | 32 | 41 | -9 | 26 |
| 10 | Køge | 22 | 8 - 2 -12 | 35 | 47 | -12 | 26 |
| 11 | Silkeborg | 22 | 5 - 7 -10 | 27 | 34 | -7 | 22 |
| 12 | Viborg | 22 | 5 - 7 -10 | 33 | 42 | -9 | 22 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

### Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Herfølge | 19 | 14 - 2 - 3 | 45 | 23 | 22 | 44 |
| 2 | Frem | 19 | 12 - 3 - 4 | 45 | 27 | 18 | 39 |
| 3 | Fredericia | 19 | 9 - 6 - 4 | 27 | 15 | 12 | 33 |
| 4 | Skjold | 19 | 9 - 4 - 6 | 36 | 21 | 15 | 31 |
| 5 | Vejle | 19 | 9 - 4 - 6 | 32 | 30 | 2 | 31 |
| 6 | Randers F. | 19 | 9 - 3 - 7 | 38 | 31 | 7 | 30 |
| 7 | HFK Sønderj. | 19 | 8 - 5 - 6 | 40 | 34 | 6 | 29 |
| 8 | Ølstykke | 19 | 7 - 6 - 6 | 42 | 38 | 4 | 27 |
| 9 | B 93 | 19 | 6 - 5 - 8 | 27 | 30 | -3 | 23 |
| 10 | Brønshøj | 19 | 6 - 4 - 9 | 27 | 29 | -2 | 22 |
| 11 | FC Aarhus | 19 | 6 - 3 -10 | 28 | 34 | -6 | 21 |
| 12 | B 1913 | 19 | 5 - 5 - 9 | 24 | 38 | -14 | 20 |
| 13 | Hvidovre | 19 | 5 - 4 -10 | 22 | 38 | -16 | 19 |
| 14 | HIK | 19 | 5 - 4 -10 | 25 | 46 | -21 | 19 |
| 15 | AC Horsens | 19 | 4 - 6 - 9 | 26 | 34 | -8 | 18 |
| 16 | B 1909 | 19 | 3 - 6 -10 | 33 | 49 | -16 | 15 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre), John Heri Dam (Hvidovre)

### Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Viking | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 | Tromsø | 1 | 1 - 0 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 3 | Sogndal | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 | Rosenborg | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 | Lillestrøm | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 6 | Odd Grenland | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 7 | Lyn | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8 | Brann | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 9 | Aalesund | 1 | 0 - 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 10 | Stabæk | 1 | 0 - 0 - 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 11 | Molde | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 12 | Vålerenga | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 13 | Bodø/Glimt | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 14 | Bryne | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

# Óli skoraði sigursmálið

**Christian Høgni sleppur ikki at spæla, Óli Johannesen er nú fremsti álopsmaðurin hjá Hvidovre, og Ulrik Balling er sera vandamikil í Vejle**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Óli Johannesen hevur í tíggju ár verið sjálvskrivaður miðverji og harvið aftasti verjuskansi á landsliðnum. Síðani Christian Høgni Jacobsen fór til Danmarkar, hevur hann verið gott boð upp á álopsspælara á landsliðnum.

Síðsta heyst og aftur í vár var Christian Høgni Jacobsen vongverji hjá Vejle. Síðani hann fyri tveimum mánaðum síðani flutti aftur til Hvidovre, hevur Óli Johannesen verið fremsti álopsspælarin á 1. deildarliðnum.

Vejle skifti venjaran út fyri tveimum vikum síðani. Síðani Henrik Brandenburg tók um stýrisvølin hava boð ikki verið eftir Christian Høgna. Hann hevur hvørki verið á liðnum ella á beinkinum. Frammanundan venjaraskiftinum hevði tað ikki gingið væl hjá Vejle. Nú ber ikki til at siga annað, enn at tað gongur væl. Vejle hevur spælt tveir dystir, síðani teir fingu nýggja venjaran, og teir hava vunnið báðar ferðir.

Sunnudagin hevði Vejle á heimavølli vitjan av gamla stórfelagnum í Odense, B1909. Árstalsfelagið er rættuliga spert og er aftast í 1. deild. Støðan gjørdist ikki betri sunnudagin, tá ið Vejle vann 4–3 ímóti B1909.

Stóri maðurin á Vejle liðnum var Ulrik Balling, sum í fjør spældi fýra dystir við NSÍ. Longu tá ið 23 sekund vóru farin kom B1909 á odda, men Ulrik Balling syrgdi bæði fyri útjavnandi málinum og leiðslumálinum til 2–1. Málini vórðu skorað í ávikavíst 17. og 21. minutti. Tað seinna var eitt fínt langskot úr 16 metrum.

### Í síðstu løtu

Hvidovre er illa fyri í botninum í 1. deild. Teir eru á plássinum júst omanfyri strikuna, men teir eru so tætt at niðurflytingarplássi, sum teir kunnu vera. Hesa ferð vóru teir á Eysturbrúgv og spældu ímóti Skjold. Tað gekk javnt á, og tá ið vanliga leiktíðin var um at vera farin bendi alt á, at liðini skuldu fáa eitt stig í part. Men so var tað, at fremsti álopsspælarin hjá Hvidovre og aftasti verjuskansin á føroyska landsliðnum, Óli Johannesen, tók søkina í egnar hendur og skoraði sigursmálið fyri Hvidovre.

Herfølge er framvegis nógv besta boðið upp á uppflyting. Teir eru fimm stig frammanfyri næstfremsta liðið. Hesa ferð var Herfølge á útivølli í Odense ímóti B1913, sum noyddist at leggja rygg til 3–0 tap. Chris Hermansen, sum eisini var á liðnum hjá Herfølge, tá ið Jákup Mikkelsen var í felagnum, skoraði tvey mál.

Frem er næstfremst. Í Valby høvdu teir vitjan av grannunum úr Brønshøj, sum taptu 2–1. Hetta var bara fjórða ferðin í hesum kappingarárinum, at tað eydnaðist Frem at vinna á heimavølli. Hetta var tíggjundi landskappingardysturin hjá teimum í Valby Idrætspark.

Johan Byrial Hansen spælir við Horsens, sum er undir niðurflytingar strikuni. Hesa ferð var Horsens partur av grannauppgerð í Århus, har FC Aarhus vann 2–1.

Mest óvæntaða úrslitið í 1. deild hetta vikuskiftið var, tá ið B93 vann 1–0 á útivølli ímóti HFK Sønderjylland.

Fredericia hevur ongantíð gjørt serligar skreytir í donskum fótbólti. Tað fara teir neyvan heldur at gera í hesum umfarinum. Men eftir 1–0 sigurin á Ølstykke, eru teir komnir fram á triðja plássið. So høgt hava teir neyvan nakrantíð áður verið.

HIK vann á heimavølli 3–1 á Randers Freja, sum longu í 3. minutti misti ein mann.





*Avgerandi dysturin í FM-stríðnum var kanska tann í Vági millum VB og VÍF. Bæði tí VB vann trygt, og ikki minst tí hesin dysturin so avgjørt var við til at økja um altíð neyðuga sjálvsálitið*

# Tvey í serflokki

**Meistaraheitið til Vágs og silvurið til Vestmanna. Tað var skriftin á vegginum frá fyrsta bríksli hetta kappingarárið, og tað vóru tað heldur ikki so nógv, sum fingu gjørt stórvegis við**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Stigatalvan lýgur ongan tíð verður sagt, og í so máta er kanska ikki tað stóra at tosa um, tá takast skal samanum kappingarárið 2002/2003. VB gjørdust føroyameistarar fyri fyrstu ferð í 53 ár, og hetta var fult og heilt uppiborið. Saman við VÍF, sum í ár mátti taka til takkar við silvurinum, vóru tær í einum flokki fyri seg og tað sigur helst eisini nakað, at tað bert vóru hesi bæði liðini, sum høvdu positivan málmun.

Bronsustríðið var alla tíðina sera hart. Liðini frá nummar trý til seks skiftust alla tíðina um at missa stig, men í seinasta enda vóru tað StÍF, sum vóru tær stinnastu í hesum, meðan Stjørnan, Kyndil og Neistin bara kundu iðra seg um onkur av stigunum, sum vórðu mist á vegnum.

Seinasta plássið fór til Tjaldur, sum ongan tíð veruliga kom fyri seg í kappingini.

Niðanfyri hava vit heilt stutt tikið saman um avrikini hjá teimum sjey liðunum í kappingini.

### 1 – VB

Líka so óvæntað tað var, at VB skuldu verða føroyameistarar. Eins uppiborið var gullið, sum var tað fyrsta hjá felagnum í samfull 53 ár.

Longu fyrstu umførini vóru tekin um, at her var okkurt í væntu, og eftir at tær á heimavølli vundu burtur úr fyrrverandi meistarunum úr VÍF, hugdu tær ongan tíð aftur um bak. Steypfinalan varð eisini vunnin, og tá liðið so eisini fekk javnleik í Vestmanna stutt eftir hetta, stóð tað øllum greitt, at nýtt meistaralið var funnið.

Staðfestingin av hesum kom tó frá Stjørnuni, tá hesar púra óvæntað vunnu dystin í Vestmanna, men hetta vikaði tó ikki við gleðina hjá leikarunum um, at tær nú loksins kundu rópa seg meistarar.

### 2 – VÍF

Eftir tveir greipusigrar á rað, vóru tvífaldu silvurmerkini hjá VÍF ivaleyst eitt vónbrot, men um so er, so hava tær í stóran mun sær sjálvum at takka fyri, at so er. Tað var sjálvandi ein missur av teimum stóru, tá Ioana Rápa mátti gevast, og hetta viðførdi, at spælið hjá liðnum mátti leggjast nakað um. Hetta var helst eisini orsøkin til, at úrslitini gjøgnum árið vóru nakað svingandi, men tað slepst ikki undan, at ein ávís metta eisini hómaðist á liðnum. Ein metta, sum viðførdi, at leikararnir kanska ikki góvu seg heilt so nógv, tá tað veruliga stóð á móti liðum, sum á pappírinum vóru veikari.

### 3 – StÍF

Eftir eitt ár í deildini, har tær eina mest royndu at stabilisera seg, sýndi StÍF í ár, at tær hava eitt av teimum heilt spennandi liðunum í deildini. Við útlendskum leikarum, sum veruliga hava profilerað seg sjálvar, og so fleiri ungum og evnaríkum lokalum kreftum tykist liðið hava nakað veruligt at byggja á. Samstundis tykjast yngru deildirnar hjá felagnum at hava góð úrslit, so eingin ivi tykist vera um, at StÍF væl kann gerast ein maktfaktorur í føroyskum kvinnuhondbólti innan alt ov langa tíð.

### 4 – Stjørnan

Var tað óvæntað, at VB gjørdist meistari, so var flotta avrikið hjá Stjørnuni ikki minni óvæntað. Undan kappingini var kreppufundur á skránni, har støða skuldi takast til, hvørt liðið skuldi takast úr kappingini. Ein roynd varð tó gjørd, og neyvan er tað nakar í Klaksvíkini, sum iðrar seg um hetta í dag.

Hóast spælið til tíðir var sera óstøðugt, so var stríðsviljin á liðnum alla tíðina framúr, og fram til tað seinasta vóru tær partur av bronsustríðnum, men har gjørdust tær tó ov stuttar í seinasta enda.

### 5 – Kyndil

Eftir fleiri vónbrot skuldi Kyndil veruliga spíla seg í ár, men liðið megnaði ongan tíð av álvara at liva upp til høgu vónirnar. Snøgt sagt, so var spælið hjá liðnum alt ov óstøðugt, og í grundspælinum megnaðu tær millum annað at vinna báðar dystirnar móti VÍF, meðan heimadysturin móti Tjaldri var taptur.

Og spurningurin er so helst, hvussu verður næsta ár hjá liðnum. Verður bulurin á liðnum tann sami, er einki at ivast í, at Kyndil væl kann blanda seg í stríðið um heiðursmerki, men tað krevur størri støðufesti frá liðnum og ikki minst av einstøku leikarunum.

### 6 – Neistin

At kvinnurnar hjá Neistanum endaðu árið á einum sætta plássi, man mest sum vera eindømi í søgu felagsins. Undan árinum var heldur ikki so nógv, sum bendi á, at so skuldi verða, tí hóast nakrir av berandi leikarunum vóru farnar burturfrá, so vóru aðrar komnar í teirra stað.

Drúgvir skaðar hjá fyrst og fremst Jórun Ludvig og Christinu Holm gjørdu tó, at hesar ongan tíð gjørdust tær berandi kreftirnar, sum tað annars var lagt upp til, og so bleiv tað alla tíðina tungt hjá liðnum. Eitt skifti í endaspælinum var liðið eisini í beinleiðis niðurflytingarvanda, men tí gongdini fingu tær tó vent.

### 7 – Tjaldur

Runavíkingarnir vóru alla tíðina botnliðið hetta árið. Onkun tíð vóru tekin um, at tær ætlaðu at vinna seg longur upp á talvuni, men tær vóru næstan hvørja ferð ov stuttar, tá tær høvdu møguleikan fyri stigum. Og sum endaspælið leið gjørdist tað alt meira greitt, hvønn vegin tað bar. Leikararnir góvust við at stríðast eins nógv fyri felags søkini, og seinastu dystirnar var talan mest sum hvørja ferð um stórtap.